# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Mítt samband við Sir Alex Ferguson hevði verið sera gott, men í fjør kendi eg tað, sum at hann stakk ein knív í ryggin á mær*

*Ruud van Nistelrooy, fótbóltsspælari í Real Madrid*

## B71 og AB bresta saman

Leygardagin spæla tey bæði fremstu liðini í 1. deild ímóti hvørjum øðrum. B71 liggur fremst við 45 stigum fyri 19 dystir, meðan AB hevur 40 stig fyri 18 dystir. Sum støðan er í 1. deild í løtuni, liggja B71 og AB væl fyri at vinna sær uppflyting, nú seinastu umførini skulu spælast.

B71 kann við einum sigri á AB leygardagin mest sum tryggja sær uppflytingina til bestu deildina, meðan AB kann fáa trupulleikar, um liðið tapir dystin. AB hevur tó fleiri stig at geva út av, tí LÍF og TB, sum eru í hølunum, hava bæði 36 stig fyri 19 dystir.

TB skal leygardagin spæla á heimavølli ímóti HB, meðan LÍF fer á vitjan hjá SÍ í Sørvági. Seinasti dysturin verður millum KÍ og Royn í Klaksvík.

## Símun hevur leikbann

Føroyski landsliðsspælarin Símun Samuelsen hevur leikbann, tá ið íslendska felag hansara, Keflavík, skal spæla um vikuskiftið. Símun, sum hevur verið fatur maður á liðnum hjá Keflavík og hevur staðið seg sera væl, hevur fingið ov nógv gul kort, og hann kann tí ikki spæla ímóti Fylkir sunnudagin. Símun er tøkur aftur til dystin ímóti Válur tann 16. september.

## Holst skal til Århus

Christian Lamhauge Holst og liðfelagarnir í Lyngby hava truplan dyst á skránni í donsku 1. deild um vikuskiftið. Lyngby liggur á odda í deildini, og sunnudagin sleppa teir veruliga at royna seg, tá ið teir spæla á útivølli ímóti AGF. Higartil hevur AGF fingði misjøvn úrslit, men liðið verður roknað sum tað sterkasta í næstbestu donsku deildini. Sambært donsku Tipstænastuni er AGF eisini favorittur til at vinna dystin. Vinnur AGF dystin, gevur tað pengar 1.95 ferðir aftur, meðan sigur til Lyngby gevur 3.05 í odds.

# GÍ hevur ikki vunnið í tríggjar mánaðir

**GÍ og HB hava eitt leikbann í part, tá ið liðini bresta saman í Gøtu sunnudagin. Tað eru gingnir tríggir mánaðir, síðani GÍ seinast vann í Formuladeildini, og tá var tað júst ímóti mótstøðuliðnum sunnudagin**

GÍ-HB
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Seinast GÍ vann ein dyst í Formuladeildini var tað ímóti HB, sum liðið aftur skal spæla ímóti sunnudagin*

Í Gøtu hungra tey av álvara eftir einum sigri, tí tað eru gingnir tríggir mánaðir, síðani GÍ seinast vann í Formuladeildini.

Tað var tann 14. juni, tá ið GÍ vann flottan sigur ímóti HB í Havn. Hetta var eisini umfarið, tá ið GÍ av álvara blandaði seg upp í oddastríðið, men síðani hevur liðið ikki vunnið.

Fimm av teimum seks seinastu dystunum eru endaðir við javnleiki, og GÍ hevur spælt 10 javnleikir í hesum kappingarárinum – tá er javnleikurin ímóti ÍF seinast strikaður, tí nýggjur dystur skal spælast.

**Ivast í leikbanni.**

Og júst strikaði dysturin í Fuglafirði, hevur fingið tey í Gøtu at ivast í, hvør spælari hevur leikbann til dystin ímóti HB sunnudagin. Símun Louis Jacobsen var leikbannaður til dystin ímóti ÍF, og í dystinum ímóti ÍF fekk Kaj Ennigarð sítt fimta gula kort og átti at havt leikbann ímóti HB.

Seinast vit tosaðu við FSF, var eingin niðurstøða gjørd um gulu kortini í dystinum millum ÍF og GÍ, sum skal spælast av nýggjum, men mest sannlíkt er, at øll kort í dystinum verða strikað, og tí verður tað Símun Louis Jacobsen, sum hevur leikbann sunnudagin.

Allir hinir spælararnir hjá GÍ eru tøkir

**Vagnur leikbann**

HB hevur so at siga fulla manning, tá ið liðið sunnudagin fer til Gøtu. Vagnur Mohr Mortensen fekk tveir dagar leikbann eftir útvísingina ímóti NSÍ, og hann skuldi sita yvir, tá ið EB/Streymur og HB spældu steypadyst mikukvøldið. Tann dysturin var av ongum, og tí kann Vagnur ikki spæla sunnudagin.

Allir hinir spælararnir hjá HB eru klárir til dystin ímóti GÍ.

# VB/Sumba vil hava stig

**VB/Sumba vil hava stig burtur dystinum móti oddaliðnum. Teir hava heimavøll og allir mans eru klárir. Oddaliðið hevur eisini so at siga alt fólkið klárt, og har er kravið heilt einfalt trý stig**

VB/S-EB/STR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Oddaliðið EB/Streymur og botnliðið VB/Sumba eru fullmannað til dystin í Vági sunnudagin*

Tað er ikki yvir at dylja, at báðir partar kunnu liva við at missa stig, tá bæði VB/Sumba og EB/Streymur hava fimm stig niður til sínar nærmastu kappingarneytar. Men greitt er, at VB/Sumba enn ikki hevur tryggjað sær sess í deildini komandi kappingarár, og at EB/Streymur ikki hevur vunnið sítt fyrsta FM nakrantíð enn. Tí fara báðir partar at gera sítt besta til at fáa stig og helst fleiri burtur úr dystinum á Eiðinum í Vági sunnudagin.

Heimaliðið hevur allar mans tøkar. Hvørki leikbann ella skaðar merkja hópin á nakran hátt, og fara allir mans at gera sítt til, at liðið nú reisir seg eftir ósigurin fyri B36 seinast. Undanfarnu dystirnir og venjaraskiftið høvdu givið ábendingar um, at felagsliðið í Suðuroynni hevði funnið stevið, nú teir vunnu á GÍ og spældu javnt móti KÍ, áðrenn meistararnir koppaðu teimum í Vági.

**Verjuspælari farin**

Hjá EB/Streymi eru so at siga allir mans tøkir. Tó hevur felagið nú sagt Ólavi Poulsen farvæl. Hann fer av landinum og tí verður oddaliðið ein verjuleikara færri, tað ið eftir er av kappingarárinum.

Ólavur Poulsen er einasti maðurin, sum felagsliðið heilt víst ikki roknar við sunnudagin, meðan tað framvegis er ivasamt, hvørt Jørgen Meitilberg verður tøkur ella ikki, eftir at hann hevur verið úti við trupulleikum í lærkrikanum í eina tíð.

Men er Jørgen Meitilberg eitt ivamál undan dystinum, so er tó ongin ivi um, at hvat oddaliðið fer eftir, nú teir fara suður. Trý stig er kravið um teir ætla at varðveita fjarstøðuna til B36, tí tað kann á ongan hátt roknast við, at nærmasti kappingarneytin fær annað enn trý stig í Gundadali sunnudagin, tá botnliðið B68 vitjar.